


# FRÁGREIÐING

# DAGSTOVNURIN GJÁI, VIÐ GØTUGJÓGV – 2016

## Innleiðing:

Á býráðsfundi tann 2. mai 2016 er samtykt, at **bygt verður afturat verandi dagstovni** við Gøtugjógv. Á býráðsfundi tann 6. juni 2016 er samtykt, at arbeiðsbólkur verður settur at gera uppskot til dagstovn. Arbeiðsbólkurin er samansettur soleiðis:

- 2 politisk umboð, Hanus Jacobsen og Emma Rasmussen
- Leiðarin á Gjáa, Dagbjørt Ó. Hansen
- Eitt foreldraumboð, Martha Poulsen
- Eitt starvsfólkaumboð, Rannvá R. Hentze
- Eitt umboð fyri leiðsluna í Eysturkommunu, Ove Heinesen

Arbeiðsbólkurin hevur verið og kannað dagstovnar fyri at síggja fyrimunir og vansar, innrætting, funktionalitet, hugskot, samanseting av rúmum, atkomu og parkering umframt, at samskift hevur verið við starvsfólk. Vitjað varð í Miðvági, á Toftum og á Kambsdali.

Bólkurin er samdur um, at tá ið talan eru um "at bygt verður afturat verandi stovni", merkir hetta, at bygt verður uppí verandi stovn ella leyst frá.

## Byggiharri er:

Eysturkommuna

Kulibakki 8

FO 520 Leirvík

## Dagstovnurin er:

Dagstovnurin Gjái

Vaktarhúsvegur 1, matr. nr. 4

FO 511 við Gøtugjógv

## Ynskir/brainstorming:

Arbeiðsbólkurin hevur sett orð á tørv í mun til ein framtíðar dagstovn (1. byggistig), sum fevnir um fylgjandi pkt.:

- 4 vøggustovur og 13 børn á hvørja stovu.
- Mobilan vegg v/hurð millum 2 stovur t.v.s., at 2 stovur kunnu leggjast saman til eina stovu.
- Til hvørja stovu er eitt eyka spælirúm afturat stovuni - 4 rúm í alt.
- Vesi – og skiftingarrúm við allari útgerð.
- Garderoba 4x13 stk.
- Garderoba til starvsfólk
- Vognarúm til 4 x13 vognar, umframt 3 dupultstólar
- Útivognarúm, umframt uttandura garð og tak.
- Vátrúm.
- Hiti í gólvunum.
- Felagskøk, sum líkur heilsufrøðilig krøv og tilhoyrandi rúm til køkin.
- Te-køkur í vøggustovum, 4 stk.
- Øll vindeygu skulu vera niður á gólvið (uml. 30 cm uppfrá)
- Sansarúm.
- Rúm til fjølbrekað børn – serstova.
- Púturúm.
- Vaskirúm.
- Goymslurúm.
- Vesi/brúsa til starvsfólk.
- Ventilatiónsskipan og rúm til skipanina.
- Hitaskipan.
- El-talvur og stýringar.
- Atkoma.
- Ferðsla.

Verandi stovnur er 350 $m^2$ til støddar.

Fíggjarliga ramman er 8,0 mill. kr. við støði í langtíðarfíggjarætlanini, har 8 mill. kr. eru settar av í fíggjarárinum 2017.

## Lýsing av málinum og visjón:

Á fundi í arbeiðsbólkinum 5. oktober varð uppskot við umráðandi funktiónum lagt fram. Lýsingin er í stóran mun gjørd við íblástri frá stovnsleiðaranum, starvsfólkaumboðnum og foreldraumboðnum.

Umráðandi funktiónir:

- Stovurnar liggja lið um lið við mobilum veggi ímillum. Harvið fáa stovurnar betur gagn av tillutaðu normeringini.
- Útsýni út á víkina, til Norðragøtu og Syðrugøtu frá øllum stovum og spælirúmum.
- Vindeygu skulu vera umleið 30 cm upp frá gólvinum.
- Møguligt skal vera at sleppa á vesi, í garderobu og vognarúm uttan at fara ígjøgnum stovuna.
- Vognarúmið skal hava hurð beinleiðis til soviplássið úti.
- Hurð skal vera frá stovuni og út á spæliplássið.
- Tá børn koma vát inn, skal tað vera møguligt at fara inn gjøgnum vátrúmið og víðari í garderobuna.
- Ynskiligt er, at dagsljósið kemur væl inn í stovuna frá ymiskum síðum.
- Hetta skal vera ein stovnur, har børn og vaksin hava ta kenslu, at vit eru úti í okkara fantastisku náttúru/skapanarverki, men samstundis eru inni í góðum umstøðum.
- Ein sansastimbrandi stovnur.
- Har rúmið er tann 3. pedagogurin bæði úti og inni.

Saman við omanfyristandandi lýsing, sum inniheldur umráðandi funktiónir, er yvirlit av støddum á rúmum og hvussu rúmini kunnu skipast. Eisini er felagsrúm/miðhøll, felags køkur, sum lýkur heilsufrøðilig krøv og útiøki (spælipláss) sí mynd 1 á s. 5.

Støddin á rúmum í uppskotinum er 628 $m^2$ + felagshøli, ið er uml. 290 $m^2$, felagskøk, ið er uml. 25 $m^2$, goymsla, vaskirúm og rúm til ventilatión, el-talvur og hitaskipan.

Arbeiðsbólkurin var samdur um, at hetta er ein góð lýsing av einum komandi stovni (1. byggistig) og ynskjum til ein nýggjan stovn (vøggustovur). Stovnurin verður munandi størri enn upprunaliga ætlað!

Hugsast kann, at ein arkitektakapping er neyðug, tí at staðsetingin av stovninum skal implementerast í náttúruna / skapanarverkið og í mun til lendið.

Á fundinum 5. oktober var tosað um verandi dagstovn og um, hvørjar funktiónir framhaldandi kunnu nýtast, sjálvt um bygt verður uppí ella leyst frá verandi stovni. Í býráðssamtyktini frá 6. juni 2016 stendur, “at bygt verður afturat verandi dagstovni við Gøtugjógv”.

Á fundi 12. oktober varð uppskotið, ið var lagt fram á fundinum 5. oktober umrøtt. Arbeitt var á hesum fundi við møguleikum at arbeiða víðari við uppskotinum og, hvussu uppskotið kann tillagast samtykt býráðsins frá 6. juni 2016.


Vognarúm úti
Kamar / 4 m x 4 m
Stova-køkur / 6 m x 8 m
Vognarúm /10 m x 4 m
Vátrúm / 2½ m x 4 m
Wc/ skiftirúm / 4 m x 3 m
Garderopa 5½ m x 4 m
St. wc
Goymsla
Miðhøll
Sandkassi
Teaturpláss
Vatn land
Útsýni ímóti víkini

Mynd 1.

Arbeiðsbólkurin sær fyri sær, at ein nýggjur dagstovnur verður gjørdur í byggistigum (1., 2. og 3. byggistig) og at verandi bygningur verður brúktur og umbygdur í mun til tørvin á funktiónum, sum skulu tillagast fyri at fáa størst møguliga nyttu úr hvørjum fermetri meðan bygt verður.

Ein nýggjur stovnur nøktar ein tørv til 52 vøggustovubørn í nýggja bygninginum (1. byggistig) og 50 (18 + 18 + 14 børn) barnagarðsbørn í verandi bygningi. Hetta gevur pláss til 42 fleiri børn enn í verandi støðu.

Í verandi dagstovni eru íalt um 60 vøggustovupláss/barnagarðspláss.

Verandi stovnur/bygningur skal nýtast fult út. Fyrst skal havast í huga, tørvin á ansingarplássum og um møguligt, at nýta møguligar tøkar fermetrar til annað, so sum kreativ høli, køk, spælistovu v.m.

Bólkurin er komin fram til og metir, at neyðugt er at hyggja longur fram í tíðina og ikki hava fokus á neyðturviliga tørvin á dagstovnaøkinum her og nú, tí at tilgongdin av børnum økist skjótt. Tí verður mælt til, at ein nýggjur dagstovnur við vøggustovum, barnagarði, felagshøli, atkomu og parkering verður bygdur í stigum á økið vestanfyri verandi stovn.

Støddin á stovninum hevur týdning í mun til, hvussu nógv starvsfólk og børn hesin skal rúma fyri at fáa ein góðan stovn, tá hugsað verður um trivnað, nærveru og at náa tí einstaka barninum í størst møguligan mun.

Bólkurin sær týdningin í og møguleikarnar við eini miðhøll og at hendan verður hugsað inn í 1. byggistig. Hendan kann tó bíða til eitt seinni byggistig.

Bólkurin sær tað sum týðandi, at byggingin verður gjørd í samanhangandi byggistigum, soleiðis at byggingin verður so bílig og skynsom sum gjørligt.

Bólkurin hevur  ikki kannað, um tað er møguligt at nýta verandi hitaskipan til komandi byggistig.

Tilmæli:

Arbeiðsbólkurin mælir til at hava arkitektakapping til nýggja stovnin og at 3 fyritøkur verða bjóðaðar við til kappingina.

Út frá frammanfyri nevndu kanningum, brainstorming, fundum og kanning av dagstovnum í Føroyum, mælir arbeiðsbólkurin til fylgjandi:

1. At nýggjur dagstovnur verður bygdur við Gøtugjógv.
2. At nýggjur dagstovnur fevnir um vøggustovur og barnagarðsstovur.
3. At dagstovnurin, tá ið hann er liðugt bygdur rúmar íalt uml. 90 – 110 vøggustovubørn og barnagarðsbørn.
4. At 1. byggistig fevnir um 4 vøggustovur, sum kunnu gerast til 2 størri vøggustovur, umframt hølir til køk, goymslu v.m.
5. At 1. byggistig verður integrerað við millumbygningi til verandi dagstovn Gjáa og verður bygd í 2017/2018.
6. At 2. byggistig fevnir um millumbygning/felagshøli, rúm til el- og hitaskipan umframt parkering og atkomuveg omanfyri verandi dagstovn og verður bygd í 2018/2019.
7. At 3. byggistig fevnir um bygning við 4 barnagarðsstovum, sum verður bygdur saman við millumbygningin/felagshøli og integrerað við parkering og atkomuvegin, sum er gjørdur í 2. byggistigi. 3 byggistig verður bygd í 2019/2020.
8. Í 3. byggistigi verður millumbygningurin, sum er nevndur undir pkt. 5 tikin burtur.

Arbeiðsbólkurin hevur tikið støðu til hvørjar funktiónir ein nútíðar bygningur til dagstovn skal rúma og hvørji krøv skulu setast til ein funktionellan stovn, har børnini kunnu kenna seg væl, fáa møguleika fyri menning mentalt og kropsliga.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki tikið støðu til, hvussu dagstovnurin skal formast, hvussu bygningurin kann leggjast í lendið, uttanumøkið til børnini, atkomu, ferðslu, útsjónd o.a.

Í hesi frágreiðing hevur arbeiðsbólkurin ikki tikið støðu til:

- Góðsku á bygninginum
- Hvørjum tilfari bygningurin skal byggjast úr
- Ljós inni og úti
- Hitaskipan og ventilatión, inniluft
- Atkomu og ferðslu inni og úti hjá børnum, starvsfólki og rørslutarnaðum
- Yvirflatur, heilsu og æstetik
- Útsjónd
- Endaligar støddir á rúmum í breidd og hædd
- Møguliga fleiri hæddir
- Ráðgevara
- Arbeiðstøkur

- Serøki i sambandi við ljóð, brunatekniskt øki og umhvørvi
- Grønan bygning, rakstur
- Samskipan
- Tíðarætlan
- Framtíðar fíggjarligar rammur

Arbeiðsbólkurin mælir til, at ein nýggjur dagstovnur stendur liðugur í 2020.

Saman við hesum tilmæli er tekning (kassar) sí mynd 2 á s. 9, sum lýsir byggistigini til nýggjan dagstovn við Gøtugjógv. Hvussu stórar eindirnar kunnu ella skulu vera, er knýtt at barnatali og nøgd av funktiónum. Hetta hevur eisini ávirkan á kostnaðin fyri stovninum.

Mælt verður eisini til, at gjørd verður ein tíðarætlan fyri arkitektakapping, projektering og útboð í inniverandi ári. Somuleiðis skal ein byggiskrá gerast í inniverandi ári.

Samlaði metti kostnaðurin fyri øll 3 byggistigini kr. 24.000.000 – 28.000.000


Mál: Barnagarðurin Gjái við Gøtugjógv
útbygging av barnagarði
Teknað: S.G.
Mát: 1:1000
Dagfest: 10-03-2016
Broytt:
Tekn. nr.
(99) 1.02
Eysturkommuna - postboks 30 - Landsvegur 2 - FO-510 Gøta - tel.: 73 00 00 - Fax: 73 00 01 - mail: eystur@eystur.fo
Útbygging av stovnunum
uml. 332 m2 útv. mát
uml. 142 m2 útv. mát
Útbygging av stovnunum
uml. 332 m2 útv. mát
Verandi stovnur
uml. 332 m2 útv. mát
P-Pláss
Vegur
6,00 - 7,00
N

Mynd 2.

Leirvík, 11. november 2016

________________________________
Dagbjørt Ó. Hansen, stovnsleiðari

________________________________
Martha Poulsen, foreldraumboð

________________________________
Rannvá R. Hentze, starvsfólkaumboð

_________________________________
Emma Rasmussen, býráðslimur

_________________________________
Hanus Jacobsen, býráðslimur

_________________________________
Ove Heinesen, leiðsla